LM-047/2020

Fylgiskjal 3

Dátueftirlitið

Fíggjarmálaráðið
Tinganes
Postrúm 2039
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 2. oktober 2020
J.nr: 20/00269-3
Tykkara skriv:
Málsviðgeri:

Viðvíkjandi.: Viðmerkingar til uppskot til broytingar í løgtingslóg um ferðslu

Dátueftirlitið hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu.

Dátueftirlitið hevur hesar viðmerkingar.

Sambært § 11 b, stk. 3 og 7, í uppskotinum kunnu tunnilsfeløgini, P/F Vága Floghavn og tilbúgvingarnar fáa tøkniligar upplýsingar um akfarið. Sambært viðmerkingunum kunnu feløgini millum annað fáa upplýsingar um slag av akfari og model á akfarinum. Upplýsingar um slag av akfari og model á akfarinum kann vera viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum, t.d. um akfarið er til fólk við rørslutarni o.s.fr. Dátueftirlitið vil mæla til, at tað verður tikið hædd fyri hesum, og at feløgini hava nágreiniligar mannagongdir fyri viðgerð av persónsupplýsingum. Nøktandi trygdartiltøk skulu verða sett í gildi og í verk, sum forða fyri, at óviðkomandi fáa atgongd til persónsupplýsingarnar, ella at tær verða misnýttar. Trygdartiltøkini skulu vera skjalfest og viðvíkja fyriskipanarligari, tekniskari og fysiskari trygd.

Vegna Dátueftirlitið

Hjørleivur Sørensen